# Orcades Viking farin triðja túrin

**Um nýggjarsleitið landaði trolarin, Orcades Viking, sum roynir út fyri Vesturafriku, stívliga 800 tons av rossamakreli. Hetta er annar túrurin, síðan P/F Ækon keypti skipið**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um dagarnar fingu vit hesa frálíku myndina av teimum trimum føroyingunum, sum eru við trolaranum, Orcades Viking, sum felagið Ækon nú eigur.

Teir, ið standa aftanfyri felagið, eru Bjarti Mohr, sum er reiðari og ein vinmaður hansara í Íslandi.

### Tríggir føroyingar

44 mans eru við Orcades Viking, sum roynir út fyri Mauritaniu í Vesturafriku.

Av manningini eru tríggir føroyingar, Páll Jóhan Poulsen, sum er skipari, Heðin Hansen, sum er maskinstjóri og Knút Olsen, sum er trolmaður.

Bjarti Mohr, reiðari, sigur, at meginparturin av manningini eru russar, og hann letur ógvuliga væl at teimum sum sjómenn.

– Teir eru ógvuliga dugnaligir trolmenn, og hetta eru fittir menn, sigur hann.

Bjarti Mohr vísir á, at enn er hetta projektið so nýtt fyri teir, men sum skilst á reiðaranum, er ætlanin, at fleiri føroyingar skulu umborð á Orcades Viking sum frá líður.



*Hetta er annað lív enn tað, vit kenna í føroyskum sjógvi um vetrarnar. Her síggja vit føroysku garparnar umborð á Orcades Viking, fv.: Páll Jóhan Poulsen, skipari. Hann er strandingur, sonur Jóhannus Poulsen, sum førdi Roc Amadour. Síðan kemur Heðin Hansen, maskinstjóri, sum er sonur handilsmannin, Gabriel Hansen í Nólsoy. Triði maðurin á myndini er Knút Olsen, sum er havnamaður og sonur Magnus Olsen, sum hevði Báruna. Myndin er tikin nú á nýggjárinum*

### Triði túrurin

Ocean Viking er nú farin á triðja túrin, síðan P/F Ækon keypti skipið.

– Tann fyrsta túrin høvdu teir umleið 900 tons, og hendan seinna var veiðan stívliga 800 tons.

Bjarti Mohr sigur, at meginparturin av veiðini er rossamakrelur, men nakað er eisini av vanligum makreli, sum kortini ikki er hin sami, ið fær her um okkara leiðir.

– Nú í januar byrjar sesongin í mauritanskum sjógvi, og vit eru spentir upp á, hvussu hendan tíðin fer at roynast.

### Heilfrysta umborð

Øll veiðan verður skild í støddir og heilfryst umborð.

Bjarti Mohr sigur, at tá ið veiðan verður landað, verður ikki farið til lands.

– Skipanin er á leið hin sama, sum hjá russum, sum liggja í Nólsoyarfirði. Lagt verður inn í eina vík, har farmaskip kemur eftir fiskinum, sigur reiðarin, sum leggur aftrat, at landingin ikki fer fram úti á opnum havi.

Myndin er tikin á dekkinum á Orcades Viking í besta veðri – og undir brennandi sól á nýggárinum!

# Skúlaflokkur umborð á Magnusi Heinason

**Tá ið næmingarnir høvdu sæð skipið, fingu tey nekarakyss og sunkist í messuni**

SKÚLI OG VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein dagin í hesi vikuni vitjaði ein skúlaflokkur av Venjingarskúlanum í Havn umborð á havrannsóknarskipinum, Magnusi Heinason.

Hetta var ein 3. flokkur, sum hevur havt evnisviku um fisk.

Fólk frá Fiskirannsóknarstovuni vístu børnum og lærarum skipið, og tá ið tey høvdu verið ein forvitnisligan "rundtúr", endaðu tey í messuni, har øll børnini fingu nekarakyss og sunkist.

Mourits Mohr Joensen, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni og vísti børnum og lærarum skipið hendan dagin, sigur, at tað var stuttligt at hava børnini umborð.

– Tey vóru stak fitt, og eg haldi, at tey hugnaðu sær hesa løtu, meðan tey vitjaðu umborð, sigur fiskifrøðingurin.

Sosialurin royndi at fáa fatur á læraranum, Rubek Lilaa, í gjáramorgunin, men telefonin hjá honum svaraði ikki. So, hann hevur helst verið upptikin við evnisvikuni og børnunum í skúlanum.



*Mourits Mohr Joensen vísir næmingunum, hvussu tekniska útgerðin á brúnni virkar*



*Lív er í, og hóast ungir á aldri, rætta næmingarnir fingurin upp, tá ið fiskifrøðingurin spyr*